


*Brunnurin, sum ChevronTexaco hevur borað liggur skamt frá markinum. Á kortinum er hann merktur 204/17 og liggur í tí ljósabrúna økinum beint eystan fyri loyvið hjá Agip, sum fer at bora í juni. ChevronTexaco hevur bundið seg til at bora tveir brunnar í loyvinum. Brunnurin, sum er boraður, er tann norðari.*


## Hátrýst yvir Føroyum



Lágtrýstini standa alsamt í biðirøð vestan fyri Føroyar. Kortini hevur tað eydnast einum einsamøllum hátrýsti at trokað seg framum. Tað er 500 bar og hægsta hátrýst, ið hevur verið her um leiðir. Hetta hátrýst verður verandi, og endamálið er eittans: At beina burtur leysa máling, skitt og aðra óhumsku. Vilt tú hava skitt ella leysa máling av vegginum ella takinum, er at taka telefonina og trýsta 42 31 11. So koma vit á staðið við okkara rullandi hátrýsti!

**Ring 42 31 11**

**SANDBLÁSING**
VEGGJARENSAN & TAKRENSAN

Spf. Sandblásing · 488 Ljósá · Telefaks 42 34 32 · sandblas@post.olivant.fo


# Stórur spenningur um boring við markið

**Fyri leitingina á føroyska landgrunninum hevur hesin brunnurin stóran áhuga. Tí er talan um eitt fund, so merkir tað samtíðis, at fundið vil vera tað, sum liggur tættast upp at markinum**

OLJULEITING
*Jan Müller*

Risastóra oljufelagið ChevronTexaco er júst liðugt við at bora ein kanningarbrunn skamt frá føroyska markinum. Felagið setti hol á »spudded« við boriskipinum West Navion tann 28. mars og endaði boringina 20. apríl. Talan er um ein brunn í teiginum 204/17, sum liggur tætt uppat loyvinum hjá Agip og Føroya Kolvetni á føroyska landgrunninum, ella umleið tveir kilometrar frá sjálvum markinum.

Frá skrivstovuni hjá ChevronTexaco í Bretlandi verður upplýst, at brunnurin er eitt sokallað »tight hole« tvs. at einki verður upplýst alment um úrslitið av boringini. Vit frætta tó, at boringin upprunaliga varð ásett til at vara í umleið 50 dagar. Nú boringin bert tók góðar tríggjar vikur ella bert umelið helvtina av tíðini, sum ásett varð til boringina, spurdu vit hjá ChevronTexaco, um hetta merkir, at tey hava troffið við olju ella um tað merkir, at har var einki at fara eftir, er svarið, at ongir upplýsingar fara út í løtuni.

Prospektið eitur »Fleet North« og hevur fyrr ljóðað, at ChevronTexaco hevur havt stórar vónir til júst hetta prospektið, sum felagið fekk tillutað í 19. rundu í harðari kapping við fleiri onnur oljufeløg. Tað liggur á meira enn 1000 metra dýpi.

Fyri leitingina á føroyska landgrunninum hevur hesin brunnurin stóran áhuga. Tí er talan um eitt fund, so merkir tað samtíðis, at fundið vil vera tað, sum liggur tættast upp at markinum. Annars er brunnurin nakað vestan og norðan fyri verandi oljufeltini Schiehallion og Foinaven.



# Flaggdagshald í Føroyahúsinum fríggjakvøldið

**Fríggjakvøldið 25. apríl verður flaggdagshald kl. 20. Hetta er eitt av teimum mongu føstu tiltøkunum í húsinum**

**Tíðindaskriv**




Á skránni hetta kvøldið er røðan flaggdagin, sum Mikkjal Nielsen lærari fer at halda. Mikkjal er sonur Jóhan Nielsen prest sála. Páll Sólstein og Bergur Jacobsen spæla upp á trompet og klaver. Kallakórið Lítla hjá Marianne Clausen fer at syngja nøkur løg. Eisini verður felagssangur og tónleikur. Húsið bjóðar ókeypis kaffi og køkubita.

– Føroyingafelagið í Keypmannahavn plagdi at skipa fyri flaggdagshaldinum. Eisini tóku tey sær av grækarismessuni, páskaveitsluni og bókadegnum á heysti. Tíverri hevur hetta felag lagt frá sær fyri nøkrum árum síðani. Kortini hava vit hildið fast um siðvenjuna og hava skipað fyri tiltøkunum nú í fleiri ár. Tað er tó okkara vón at eitt av feløgunum tekur onkran av hesum tættum upp ella at nýtt lív birtist í gamla Føroyingafelagið, sum aftur fer at skipa fyri hesum mentanartiltøkum, sigur leiðarin í húsinum Martin Fjallstein

Á páskaveitsluni 2. páskadag, sum eisini verður nevnd skerpikjøtveitslan, vóru eini 20 fólk úr Tjørnuvík, sum hava verið niðri og sungið tey gomlu kingoløgini, sum tey eru so sera dugnalig til. Tey vóru eisini væl fagnað bæði á Suður Fjóni, Slangerup og í Samuelskirkjuni. Tey settu eisini sín dám á veitsluna 2. páskakvøld við teirra kingosangi og at sláa ring.

### Suðuroyggin í fokus

Apríl mánaður er Suðuroyarmánaðurin í Føroyahúsinum. Longu í heyst var Suðuroyarveitsla løgd at vera 5. apríl. Men nú bar so á, at finalan um »Stjerne for en aften« var kvøldið fyri, har Guðrun Jacobsen av Tvøroyri vann. Vikuskiftið gjørdist tí eitt rimmar Suðuroyarvikuskifti í húsinum. Fyri fyrstu ferð hava vit havt stórskíggja at vísa myndir á. Tað eydnaðist sera væl finalukvøldið. Áveitsluni kvøldið eftir spældi Suðuroyar-bólkurin Blanding við Jonnhild Andreassen. Torgerð Suðuroy var frásøgufólk. Um midnáttina kom »stjørnan« inn á gólvið, sang fyri okkum og var við restina av náttini.

Týsdagin 29. apríl verður so aftur eitt Suðuroyarkvøld. Døgverði er fyrst við stoktum lambskjøti og Suðuroyarkøku omaná. Síðan fara Gunnar Nolsøe úr Vági og Niels Salmony úr Trongisvági at siga frá heimbygdum sínum og hvør sínum parti av oynni.

Hvør mánaður hevur havt sítt oyggjanavn og ymist hevur verið frammi um oyggjarnar. Hetta hevur víst seg at vera gott tiltak, sum vakti ans manna millum.

Summarið kemur og tiltøkini fara at linka í Føroyahúsinum. Ætlanin er at skipa fyri eini útferð í mei og síðsti týsdagsdøgverðin verður 27. mei. Hesir døgverðar eru hvønn týsdag frá miðskeiðis í august til síðst í mei. Eini 30 – 100 fólk plaga at koma til døgverða, sum kann vera knettir, ræstur fiskur, kjálkar, saltfiskur, havhestaungar, lundi, grind og spik, turrur fiskur og bótasúpan, stokt riv, stokt lambskjøt og líknandi, sum vit kunna útvega. Eini tvær tríggjar ferðir um árið verður gjørt meira burturúr. Sum nú 27. mei verður »summarborð«, sum er sjálvtøkuborð við alskyns góðum mati. Eisini er tá meira til gaman og sangur.

# Ráðstevna um BIOFAR-kanningarnar

**Tíðindaskriv**



Í døgunum 24.-26. apríl verður ráðstevna á Hotel Hafnia, har 30 vísindafólk úr ymsum londum – einamest teim skandinavisku – at leggja fram úrslit av BIOFAR-kanningunum.

Talan verður næstan ikki um at viðgera einstakar bólkar av dýrum og plantum, men um meira generel evni, sum verða sett í perspektiv í mun til Norðuratlantshavið og almenn lívfrøðilig viðurskifti, sum har eru ráðandi.

Arne Nørrevang, doktari stendur fyri áhugaverdu ráðstevnuni

## Flaggdagshald í Vági

TÍÐINDASKRIV

Aftur í ár skipar Skótaliðið Royndin fyri Flaggdagshaldi í Vági, og sum undanfarnu ár, verður tað við Minnisvarðan, Flaggdagin 25. apríl. kl: 15.00.

Johann Dahl, løgtings- og vinnulívsmaður, flytur fram røðu, og sum trúgvir luttakarar í nógv ár, koma sangarar úr Kirkjukórunum Ljómi, at luttaka við kórsangi og felagssangi. Skótar og úlvar ganga skrúgongu frá skótahúsinum, oman til Minnisvarðan.

Øll eru hjartaliga vælkomin.